Uppskot 1 Dagf. 22-04-2024

## § 21. Ásetingar fyri øki N: Seyðhúsaøki

1. Økið verður lagt av til seyðhúsaøki, ið hóskar til umhvørvið, har byggingin fer fram. Økið liggur innangarðs.
Byggivaldið skal góðtaka snið, tilfar og byggihátt, soleiðis at byggingin hóskar til seyðhúsaøkið.

2. Grundstykkir skulu í minsta lagi vera 1000 $m^2$. Byggistigið kann í mesta lagi verða 0,05.

3. Seyðhús kunnu ikki verða bygd í meira enn einari hædd við lofti og ikki verða hægri enn 5 m til mønuna, mált frá liðug gólvhædd. Byggivaldið ásetur kotuna á gólvinum.
Hæddin frá liðug gólvhædd til yvirkant syll eigur ikki at vera meira enn 2,50 m.
Køstur eigur at vera bygdur niður í lendið og í minsta lagi er 1,00 m djúpur. Køsturin skal vera tættur og verða tømdur javnliga.

4. Fráleikin millum seyðahús og vegamark eigur ikki at vera minni enn 5,00 m og fylgja vegamarkinum.
Fráleikin millum seyðahús og grannamark eigur ikki at vera minni enn 2,50.
Parkeringspláss skal verða inni á stykkinum.

Ikki er loyvt at tøma køstin í kommunala kloakkskipan, áir o.a.

Ikki loyvt at hava frárenning í køstinum.

5. Umframt básar, súrhoyggjabrunn, hoyggjhús og goymslu, ber eisini til at innrætta høli til goymslu, kjøthjall, køk og vesi.

6. Frárensl frá seyðahúsinum og avsetta økinum verður leitt í lokaðan brunn/rottangaskipan so einki rennur út í náttúruna, ella eftir nærri áseting frá byggimynduleikanum vísandi til umhvørvisverndarlógina.

7. Seyðhúsini skulu vera soleiðis til útsjóndar og setast soleiðis í lendinum at tey lýta landslagið sum minst.